BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801




# BSA-in hjá Sverra 70 ár

Hósdagin 19. mars fyllir Sverri Mortensen á Argjum 87 ár, og í ár verður motorsúkklan hjá honum 70 ár.

Sverri var 17 ára gamal, tá BSA-súkklan var framleidd í Birmingham, og hann keypti hana frá bretsku hermonnunum eftir seinna heimsbardaga.

Súkklan hevur nummarplátuna Fø 313, sum hon hevur havt øll árini, meðan Sverri hevur átt hana.

Sverri hevur verið limur í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør síðan felagið varð stovnað fyri 17 árum síðan, í 1992. Hann er aldursforseti og heiðurslimur í felagnum, og hóast høga aldurin luttekur hann við súkkluni í øllum tiltøkum sum felagið skipar fyri.

*mg*



*Sverri Mortensen við 70 ára gomlu BSA-motorsúkkluni*




*Motorsúkklan hjá Sverra hevur nummar 313, sum annars eisini er nummarplátan á bilinum hjá Anders And*

# Skoda Octavia 50 ár



*Fyrsti Skoda Octavia kom á marknaðin í 1959*




*Nýggjasta útgávan av Skoda Octavia*

Í ár eru 50 ár síðan fyrsti Skoda Octavia kom á marknaðin.

Tann fyrsti Skoda Octavia, sum kom í 1959, var ein modernaður sedan, sum fekst við tveimum ella fýra hurðum. Bilurin, ið hevði góðar og tryggar koyrieginleikar eftir tátíðar mátistokki, varð gjørdur til 1971.

Í sambandi við 50 ára haldið fyri Octavia fer Skoda at skipa fyri fleiri jubileumsaktivitetum í hesum árinum sum t.d. rallykoyring við ellisakførum. Tiltøkini verða bæði í heimlandinum hjá Skoda, Kekkia, og í grannalandinum, Týsklandi.

Tann Skoda Octavia vit kenna í dag hevur verið gjørdur síðan 1996 við smærri broytingum. Í dag er Skoda partur av týsku VW-konsernini.

*mg*